**Um at gera ein góðan keldulista**

Í einari skrivligari uppgávu ella verkætlanarfrágreiðing verður nógv tilfar nýtt at stuðla tí, ið skrivað verður. Ein keldulisti er ein samlaður listi, við øllum tilfarinum, sum er brúkt. Tað kunnu vera bøkur, vísindaligar greinar, tíðindabrot, tónleikur, filmar ella leinkjur. Tað er av stórum týdningi at tílíkir listar eru neyvir, rætt skrivaðir og eins hjá øllum næmingunum. Keldulistin verður oftast skrivaður aftast í uppgávuni, og víst verður til keldurnar í sjálvari uppgávuni, antin við einum nummari ella við eftirnavninum á fyrsta høvundi og árstali. Tað skal vera ómakaleyst hjá lærara ella øðrum, sum lesa uppgávuna, at finna fram kelduna til tað, sum skriva verður, og viðløgd skjøl skulu brúkast so lítið sum til ber.

**Bók**

Rithøvundur eftirnavn, fornavn: *Heitið á bókini, undirheitið um eitt tílíkt er.* Útgávunummar. Forlag. Ár

Dømi :

Jensen, Jens-Kjeld & Sivertsen, Hans Eli: *Firvaldar, 155 ymiskir firvaldar í Føroyum.* 1 útgáva. Føroya Skúlabókagrunnur. 2010.

Um rithøvundarnir eru fleiri, so verður fyrsti rithøvundur skrivaður og styttingin v. fl. ella et. al. løgd afturat.

**Týdd Bók**

Christensen, Jørgen Møller & Nystrøm, Bente: *Fiskar.* Týtt og tillagað : Kjartan Hoydal. 1 útgáva. Føroya Skúlabókagrunnur 1989.

**Ritstjórna bók**

Føroya Náttúra, lívfrøðiligt margfeldi. Ritstjórna av Anna Maria Fosaa, Eilif Gaard og Jóannes Dalsgarð. 1 útgáva. Føroya Skúlabókagrunnur. 2006

**Partur úr bók**

Gaard, Magnus: *Strendur og bjørg.* Í: Føroya Náttúra, lívfrøðiligt margfeldi. 1 útgáva. Føroya Skúlabókagrunnur. 2006. bind. s 92-115

## Greinar

Grein úr tíðindablaði. Rithøvundur eftirnavn, fornavn. Heitið á grein ella yvirskrift. Í: Navn á tíðindablaði, ár, dagur, evt. navn sektión, síðir.

Dømi:

Müller, Jan: *Fiskivinnuskúlin best í øllum Evropa*. Í: Sosialurin nr 123, 1997-07-02*. s. 7-8.*

Grein úr tíðarritið:

Gaard, Magnus: *Eiðiskollur, ein leivd av gróðri úr fornari tíð.* Í: Frøði 2001, nr 2, s. 15-21

## Myndir, tónleikur og filmur

Soleiðir verða myndir, tónleikur og filmur skrivaði í keldulistan

**Myndir:**

Heiti á mynd. Myndafólk ella listafólk. Ár. Í: (Kelduávísing, bók ella leinkja)

*Skríggið.* Edvard Munch. 1895. Í: Gombrich, E.H.: Kunstens historie. 5.útgáva. Gyldendal, 1997, Síða 565.

**Tónleikur**

Tónasmiðjur: Heiti. Plátufelag, Ár.

*Swan Lee: Enter. Playground, 2001.*

**Filmur**

Filmsheiti: Leikstjóri, evt. Leikritahøvundur. Útgávufelag. Ár.

*Dogville: Lars Von Trier. Xentropa. 2003.*

## Alnótin

**Síðir á alnótini**

Heiti á síðu: Rithøvundur ella útgávufelag. Heimasíðuadressan. Dagur tú vitjaði.

Dømi:

*Mobiltelefoni:* Faktalink udarbejdet af journalist Tore Daa Funder, Mediefabrikken/Dagbladet Information. Adresse: www.faktalink.dk/publish.php?linknavn=tele. Vitjað t. 5.11.2004.

Av tí at síðir á alnótini koma og fara, er tað altíð best at skriva síðuna út og dagfesta ørkini.